# Áhugaverd framsýning við bundnum pløggum í SMS




*Nógv fólk nýttu høvi at vitja framsýningina, sum Navia og Bindibúðin skipaðu fyri á Torginum í SMS*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Hósdagin, fríggjadagin og leygardagin var áhugaverd framsýning á Torginum í SMS. Tað vóru Navia á Toftum og Bindibúðini í Havn, sum skipaðu fyri framsýningini í sambandi við, at nýggja bindibókin er komin út**

FRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á framsýningini vóru bundin pløgg av ymiskum slagi úr Navia-tógvi, sum fyritøkan á Toftum, Navia, framleiðir í Noregi.

Tógvið er framleitt úr føroyskari, hetlendskari og avstralskari ull, og hetta er úr bestu ullini, sum seyðurin í hesum londum ber.

Hósdagin, tá ið framsýningin læt upp, kom eisini nýggja bindibókin, sum Navia og Bindibúðin í felag aftur hava givið út í ár.

Í bindibókini eru 24 útvald mynstur, sum einar 20 kvinnur hava teknað.

Ein metingarnevnd hevur valt mynstrini, sum eru við í bókini, úr eini kapping, sum skipað hevur verið fyri. Hon hevur eisini valt út vakrasta plaggið, sum er evnað úr hesum mynstrum, og vinnarin var kvinnan, sum hevði gjørt mynstrið til ein dópskjóla.

Sum virðisløn fekk hon ein kekk upp á 5.000 krónur.

Allar kvinnurnar, sum fingu mynstur síni við í bókina, hava eisini fingið ein vinning frá Navia.

Tað er Óli Kristian á Torkilsheyggi, sum eigur Navia á Toftum og Eyð Nolsøe, sum eigur Bindibúðina í Havn.

Skipað varð eisini fyri mótaframsýning á Torginum, og livandi tónleikur var til undirhalds.

Á Torginum hava fólk eisini havt høvið at bundið sonevndar Móður Teresupuntar til barnateppir, sum verða send til Rumenia.

Haraftrat høvdu fólk høvi at kappast um at gitað longdina á einum noða, og her var vinningurin ein ferð til Danmarkar og aftur.

# Navia útflytir tógv

**Óli Kristian á Torkilsheyggi, sum hevur Navia, sigur, at fyritreytin fyri at útflyta føroyskt tógv, er, at fólk síggja eina bindibók, haðani tey kunnu fáa hugskot til ymisk pløgg, sum tógvið kann evnast til**

NAVIA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*- Tógvið, sum Navia letur spinna í Noregi, verður selt í Føroyum og útlandinum, sigur Óli Kristian á Torkilsheyggi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Tógvfyritøkan, Navia á Toftum, útflytir tógv bæði til Danmarkar og Noregs, og arbeitt verður eisini við at marknaðarføra føroyska tógvið á svenska og týska marknaðinum.

Tógvið hjá Navia verður spunnið í Noregi, haðani tað kemur heim til Føroya og verður selt í Føroyum og útlandinum.

Óli Kristian á Torkilsheyggi, sum eigur Navia, sigur, at fyritreytin fyri at kunna útflyta føroyskt tógv, er, at fólk, sum skulu keypa tógvið, hava eina bindibók, haðani tey kunnu fáa hugskot til ymisk pløgg.

- Tað er ikki minst í hesum sambandi, at Navia á Toftum og Bindibúðin í Havn geva út eina bindibók í felag við ymiskum hugskotum.

Í bindibókini eru útvald mynstur og pløgg, sum konufólk hava gjørt.

- Men á framsýningini, sum vit høvdu á Torginum í SMS, vóru eisini tey mynstur og pløgg við, sum ikki sluppu við í bindibókina, sigur Óli Kristian á Torkilsheyggi.

HVÍTVØRUR
BOSCH
Collection
damor



HBN230250S
ovnur við EcoClean
- EcoClean á bakvegginum
- Fult glas á hurðini
- XXL ovnur (58 litrar)
- Glattir síðuveggir
- Lynupphiting
- Multifunktións ur



PIE645E01E
kókisektión við induktión
- 4 induktiónsplátir
- Boostara funktión
- Grýturegistrering
- Cruisecontrol
- Trygdaravbrótari




Keypir tú hetta ovn- /plátusettið, fært tú umframt tann góða tilboðsprísin, eisini eitt lekkurt "hackman" stál grýtusett við í keypinum (virði 1500 kr.)

kampagnutilboð
13.998,-



HBN730550S
ovnur við pyrolysu
- pyrolysu-teknik, automatiskt sjálvreins
- fult glas í innarahurðini
- universalovnur við 8 programmun
- XXL ovnur 60 litrar
- Multifunktións ur
- Lynupphiting
- Ovnur við granitemalju
Vanl. 11.998,-

tilboð
9.998,-



Við í keypinum fæst ein sera djúp skuffa (virði 598,-)

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor